


**Eilen Anthoniussen** eilen@sosialurin.fo

# Ungi sálarhirðin í Kvívík

**Prestar arbeiða meir enn tann eina tíman um vikuna tá guðstænasta er. Í veruleikanum eru uppgávurnar nógvar og fjølbroyttar við konfirmatiónum, kirkjubókarføringum, fundum og øllum hinum, ið fylgja við starvinum. Theodor Olsen, prestur í Norðstreymoyar prestagjaldi, trívist væl í prestakjólanum, sum skapar ordan í tingini, og ger hann til sálarhirða hjá fólkinum**



Theodor Olsen tíðliga av at byrja uppá teologilesturin. Hann var bert 21 ár í 1998, tá hann byrjaði á Universitetinum í Keypmannahavn.

Ja, eg visti hvat eg ætlaði mær. Eg havi altíð havt mína barnatrúgv, og visti, at eg vildi lesa guðfrøði. Tá sigi eg ikki, at eg ikki ivaðist nakrar ferðir. Men tað ger einki at ein ivast. Ein skal ivast. Tey fyrstu tvey árini vóru hørð. Eg minnist, at vit vóru 20 lesandi, tá vit byrjaðu, og tá heystfrítíðin kom, vóru bert fýra eftir í flokkinum, greiðir Theodor Olsen frá.

Umframt kravdu lærugreinarnar, skuldi hann læra grikst og latín til fulnar, sum tók honum 20 tímar um vikuna.

Hann er uppvaksin í Hoyvík, ikki í Havn. Familjan er vanlig kirkjufólk, og sum sagt fann hann tíðliga út av, at hann vildi vera prestur.

Mær dámar betri at siga, at eg havi lisið teologi enn at siga, at eg havi lisið til prest, tí prestur er nakað, sum onnur skulu velja teg at verða. Sjálvur lesnaðurin er mettur at taka seks ár, men fyri meg tók tað eitt sindur longri, tí eg valdi at taka retorikk og jura við síðuna av. Tá eg so var liðugur, tók eg pastoralseminariið, har eg lærdi alt tað praktiska við at arbeiða sum prestur.

Men tá útbúgvingin varð fingin í hús á vetri 2007, hevði hann eitt heilt annað arbeiði á hondini.

Eg hevði fingið arbeiði á lýsingarstovu. Men sum tað eitur í prestaverðini, varð eg kallaður til starvið her í Kvívík. Eitt fyribils starv í tríggjar mánaðir. Eg tók av, og flutti úr Keypmannahavn til Kvívíkar eftir fáum døgum, sigur Theodor Olsen.



*Millum mongu uppgávurnar hjá prestinum í Kvívík, er handfaringin av kirkjubókunum*

### Teori brynjar til prestagerningin

Fyrrverandi presturin í Norðstreymoyar prestagjaldi fekk boðið annað starv, og Theodor helt fram í prestagjaldinum. Starvið er júst longt fyri sættu ferð, og er hann fyribils settur til 31. oktober í ár.

Ein kann siga, at eg fekk ein ordiligan elddóp. Eg varð liðugur við mína útbúgving 21. desember, og varð vígdur longu 6. januar, sum var neyðugt fyri at eg kundi taka við starvinum her. Eftir stuttari tíð hevði eg tikið mær av sjey konfirmatiónum í fimm ymiskum kirkjum, greiðir hann frá.

Tað er ymiskt hvussu teologi lesnaðurin verður uppbygdur í ymsu londunum, og hvussu nógv ein sleppur at royna seg. Men hóast tú kanst læra tað praktiska, meðan tú lesur, er neyvan sannlíkt, at tú kanst ogna tær so nógv av teoriini, tá tú ert byrjaður sum prestur, er kvívíkspresturin sannførdur um. Eftir sjey ára lesnað skuldi ein verið væl fyri at fara undir prestagerningin.

Ein partur av útbúgvingini er praktikkin. Eg sjálvur var í Vesturkirkjuni og í Vestre Fængsel. Í Vesturkirkjuni slapp eg at gera nógv ymiskt, tí at prestagjaldið er so stórt og fevnir um fleiri bygdir. Í Vestre Fængsel var eg hjá teimum, ið kanska mest høvdu brúk fyri einum presti.

Tað er eitt øðrvísi slag av prestagerningi. Vestre Fængsel er eitt arresthús, har tey sita, ið enn ikki hava fingið dóm. Har var kø at sleppa til guðstænastu sunnudagar, og eg mátti leggja meg eftir ikki at gera prædikurnar ov torskildar. Tað var eitt hart pláss at vera. Eftir tríggjar dagar merkti eg, at eg var kropsliga sera troyttur av at vera har, sigur Theodor Olsen.

### Lønarviðurskifti á láni

Men nú er hann langt frá Vestre Fængsel. Norðstreymoyar prestagjald við sínum átta kirkjum eitur arbeiðsplássið, og vit skulu tosa um ein arbeiðsdag hjá einum presti. Tað er nakað torført at greiða frá einum vanligum arbeiðsdegi hjá prestinum, tí dagarnir eru sera skiftandi. Her er ikki talan um nakað 8-17 arbeiði, tí presturin skal altíð vera tøkur.

Eg royni altíð at fara nøkunlunda tíðliga upp. Eg eti morgunmat, kanni teldupost og vanliga postin. Eg fái rættiliga nógvan post frá jarðarmóðrini um føðingar, sum allar skulu førast í kirkjubókina. Fólk skulu eisini hava dópsbrøv ella navnabrøv til pass, og so taki eg mær sjálvandi av jarðarferðum, brúðarvígslum og dópum, greiðir hann frá.

Av uppgávunum eru tað konfirmatiónirnar, ið kunnu taka drúgva tíð. Í arbeiðnum liggur ofta nógv fyrireiking, og nógv av arbeiðnum fer fram um kvøldarnar og vikuskiftini. Hann hevur til dømis til uppgávu at hava guðstænastur á ellisheimum, hvørt leygarkvøld er hann at hoyra í sendingini Hetta heilaga evangeliið skrivar, og í kirkjuráðunum skulu fundir haldast, m.a. skal fíggjarætlan leggjast fyri hvørt ár. Harafturat hevur hann undirvíst eitt sindur, m.a. á Læraraskúlanum.

Prestar hava rætt til ein frídag um vikuna, men tað er torført at finna tann frídagin. Eg áni ikki hvussu nógvar tímar, eg arbeiði um vikuna. Vit arbeiða enn við at